# Leyst starv

Starvið sum røktarleiðari á Gróðurstøðini (plantuskúlanum) hjá Skógrøkt landsins er leyst at søkja til setan 1. apríl 2006.

Røktarleiðarin virkar undir leiðslu av landsskógarvørðinum, og við tilvísing til hansara. Eftir fyriskipan hevur røktarleiðarin um hendi dagligu praktisku leiðsluna av virkseminum og arbeiðsmegini, ið hoyrir til Gróðurstøðina. Reglugerð er fyri starvið.

Vit sóknast eftir umsøkjarum við førleika ájavnt við støðið í norðurlendsku útbúgvingunum til jordbrugsteknolog ella til gartnara. Annar viðkomandi yrkiskunnleiki kann tó eisini góðtakast.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til landsskógarvørðin á telefon 310922/210966 ella við telduposti til: trondur@skogroktin.fo

Skrivlig umsókn, við avritum av próvskjølum, viðmælum v.m., skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mikudagin 15. mars 2006. Umsóknin skal sendast til:

**Skógrøkt Landsins**
Hvítanesvegur 3 · Postrúm 1174 · 110 Tórshavn
Teldupostur: skogroktin@skogroktin.fo

*Skógrøkt Landsins er stovnur undir Innlendismálaráðnum og innur uppgávur og áhugamál Skógfriðingarnevndarinnar. Stovnurin skal røkja gamlar og nýggjar viðarlundir og aðrar frílendisuppgávur, sum hoyra uppí. Somuleiðis rekur stovnurin Gróðurstøðina við plantualing, plantusølu og arboretvirksemi.*

MIÐVÁGS KOMMUNA

# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður við hesum gjørt kunnugt, at Miðvágs bygdaráð á fundi tann 14. desember 2005 samtykti at broyta býarplanin fyri Miðvágs kommunu soleiðis, at eitt øki Norði í Heiðum, eitt øki á Grímsmørk, Toftatrøðni, Heimaru Húsatrøð og Uppi í Gerði og eitt øki Uppi á Brekkum verða broytt frá B-øki (sethús) til I-øki (landbúnaður). Eitt øki á Týkarheygatrøðni og Heiðatrøðni og eitt øki á Leitistrøðni, Nýggjutrøð og Ápramstrøð verða broytt frá B-øki (sethús) til H-øki (landbúnaður). Eisini verður eitt øki á Heiðatrøðni broytt frá H-øki (frílendi) til B-øki (sethús).

Kort, sum vísir broytingina liggur frammi til alment eftirlit á bygdaráðsskrivstovuni í arbeiðstíðini frá mánadegnum 27. februar til mánadagin 20. mars 2006 - báðir dagar íroknaðir.

Møgulig broytingaruppskot ella mótmæli skulu skrivliga verða bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 29. mai 2006.

**Miðvágs kommuna**

# Stjóri
## til
## P/f Landingarmiðstøðin
## á Tvøroyri

Vit sóknast eftir stjóra til Landingarmiðstøðina á Tvøroyri.

Starvið er spennandi og skiftandi, men eisini rættiliga umfatandi og krevst tí, at umsøkjarin hevur fyriskipanareginleikar og evni at standa fyri fólki.

Eisini er tað ein fyrimunur at umsøkjarin hevur førleika til roknskap.

Dámar tær avbjóðingar, vilja vit fegin koma í samband við teg.

Lønin verður ásett sambært avtalu.

Vinarliga vend tær til Gudmund Mortensen, nevndarformann á tlf. 371002, um spurningar ella ivamál eru.

Skrivlig umsókn kann sendast til P/f Landingarmiðstøðin á Tvøroyri, postbox 119, 800 Tvøroyri. Stíla: Gudmund Mortensen.

Umsóknarfreistin er 3. mars, og ætlanin er, at tú byrjar skjótast gjørligt.

**P/f Landingarmiðstøðin á Tvøroyri**

*P/F Landingarmiðstøðin á Tvøroyri ella bara LMT, sum vit kalla okkum, byrjaði sítt virksemi í januar 2004. LMT fæst við at landa skip, skilja fisk út til keyparar, pakka fisk til útflutnings, og annað í hesum sambandi. LMT arbeiðir í tættum samarbeiði við fiskavirkini í Suðuroynni og Fiskamarknaðin á Toftum. Á LMT starvast íalt 12 fólk.*

# Námsfrøðingar
## til Barnagarðin á Gásamýru

Vit søkja eftir 2 námsfrøðingum til barnagarðin at byrja 1. mars ella eftir nærri avtalu.

Størvini eru 35 og 30 tímar um vikuna.

Í barnagarðinum eru 32 børn í aldrinum 3-6 ár.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiðspláss, sum er undir uppbygging og tú fært høvi til at seta tín dám á.

**Vit vænta at tú ert:**
- kreativ/ur
- fleksibul
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- initiativrík/ur

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita við at venda sær til leiðaran á tlf. 743125.

Umsókn við avritum av pógvum og møguligum ummælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 13. mars 2006 kl. 12.00.

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

# Pedagogar

Í Barnagarðinum á Teiginum heima á Sandi sóknast vit eftir tveimum pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna. Størvini, ið setast skulu, eru:

- Eitt pedagogstarv 30 tímar um vikuna í útibarnagarðsbólkinum »Lítla Teigi«, har børnini eru í aldrinum 4-7 ár.
- Eitt 30 tímar pedagogstarv, sum er tíðaravmarkað, frá 15. mars 2006 til 31. mai 2006 vegna farloyvi.

Starvið er í vøggustovuni Lítlulon, har børnini eru í aldrinum 0-2 ár.

**Krøvini til tín eru:**
- at tú ert fyrikomandi, erligur og hevur góð samstarvsevnir
- at tú arbeiðir sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn, starvsfelagar og foreldur
- at tú heldur arbeiði við børnum í ávikavist 0-2 og 4-7 ára aldri vera spennandi og avbjóðandi
- at tær dámar at verða úti í øllum veðri
- at tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- at tú er nærverandi og dugir at lurta.

**Børnini vilja:**
- at tær dámar at ganga túrar á fjall og í fjørðu
- at tú dugir ymisk dreingja- og gentuspøl
- at tú dugir at fanga krabbar eins væl og spæla við Barbidukkur
- at tú dugir at siga søgur
- at tú dugir at spæla fótbólt

Í okkara barnagarði leggja vit stóran dent á at børnini eru úti og uppliva náttúruna, umhvørvið í heimbygdini, lívið í bygdini og at tey hava tað stuttligt. Børnini skulu hava góðar umstøður at spæla og mennast í. Tað er okkara ábyrgd at skapa hesar umstøður. Vit hava góðar møguleikar at nýta fimleikahøll, vøkru náttúruna, fótbóltsvallir og bókasavn í arbeiðinum.

Størvnini verða lønt smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Lailu M. Petersen, stovnsleiðara á tlf. 361750/212751.

Skrivlig umsókn við viðmælum, skal sendast til

**Sjálvsognarstovnin**
**Barnagarðin á Teiginum**
FO-210 Sandur.

Umsóknarfreistin er úti 10. mars 2006. Størvini verða sett 15. mars 2006. Allir umsøkjarar fáa svar.

**Sjálvsognarstovnurin**
**Barnagarðurin á Teiginum**

# Kappróðrarfelagið NSÍ

Ársaðalfundurin verður í Neystinum mikukvøldið 15. mars kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins. Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur 1/2 tíma seinni.

**Nevndin**